# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## LÆR AT KOKKAST

Nógv fólk duga ikki at gera sær sjálvum góðan og sunnan mat. Jamie Oliver ger í hesari bókini eina roynd at læra fólk at gera mat, sum er góður fyri tey. Bókin er ein grundleggjandi innføring í matgerð, og Jamie Oliver sigur, at hann leitur aftur í tíðina fyri at finna rættir og matgerð, sum eru sunnir.

**JAMIE OLIVER**
Anyone Can Learn to Cook in 24 Hours



## TEIR STÓRU BRESTA SAMAN

Veruligur stórdystur er á skránni í Onglandi sunnudagin. Tá spæla tvey av fremstu feløgunum í Premier League ímóti hvørjum øðrum. Manchester United og Arsenal, sum stríðast í toppinum í deildini, skulu spæla um trý týðandi stig. Fyri nøkrum mánaðum síðani høvdu fólk hug at avskriva Arsenal í kappingin, men nú er London-felagið undir liðini á Chelsea og Manchester United. Spurningurin er so, um tað kann halda í longdini.

**PREMIER LEAGUE**
Arsenal-Manchester United
Canal+ sunnudagin 31/1 kl. 16.00



## GUD VÆLSIGNI ÍSLAND

Onki annað land er so hart rakt av altjóða fíggjarkreppuni sum Ísland. Landið, sum tey seinastu árini var vorðið eitt av ríkastu londunum í heiminum, gjørdist knappliga ímyndin av alheimskreppuni og stórari atgongd við umfatandi fíggjarligum trupulleikum hjá mynduleikum, vinnulívi og privatpersónum.

**GUD VÆLSIGNI ÍSLAND**
svensk dokumentar
SvF fríggjakvøldið 29/1 kl. 19.25



## SØGAN UM WOODSTOCK

Filmurin Taking Woodstock er ein filmsútgáva av forsøguni um tiltikna tónleikafestivalin í 60'unum. Elliot og Michael fara undir arbeiðið at skipa fyri einum tónleikafestivali, men tað, sum teir ikki vita, er, at tað fara at koma 10 ferðir so nógvir gestir, sum teir rokna við. Filmurin gevur eina stuttliga útgávu av fyrireikingunum og teimum trimum døgunum, tá ið ein hálv millión fólk savnaðust til tónleik og gleim.

**TAKING WOODSTOCK**
dvd-filmur

## COUNTRY AV OVASTU HILL



Leygardag eftir leygardag borðreiðir Petur Rouch við countrytónleiki í Útvarpinum. Hann spælir nýggjar sangir, gamlar slagarar og meira ókendan tónleik. Og alt verður leitt trygt við søgum og upplýsingum um countrysangararnar, sum verða spældir

**RÓT OG RÚTMA**
ÚF leygardagin 30/1 kl. 11.00



## JASSUR Í KIRKJU

Leygardagin verður Matiné í Havnar kirkju, og hesaferð er skráin heldur øðrvísi, tí bólkurin Yggdrasil fer at spæla jass. Tey, sum manna bólkin, eru Angelika Nielsen, violin, Kristian Blak, klaver, Mikael Blak , bass, og Gudmund Mortensen, orgul.

**MATINÉ Í HAVNAR KIRKJU**
Leygardagin 30/ kl. 11.30

## FINALAN Í SEMENT

Leygarkvøldið verður finalan í tónleikakappingini Sement, sum er ein talentkapping fyri føroyskar tónleikabólkar. Dómararnir siga, at støðið í kappingini er sera høgt í ár, og nú skal gerast av, hvør skal vinna kappingina. Tvær innleiðandi kappingar hava verið, og bestu bólkarnir skulu á leygarkvøldið stríðast um sigurin.

**TÓNLEIKAKAPPINGIN SEMENT**
Perlan
leygarkvøldið 30/1 kl. 20.00

